# Stýrisfundarbók FKF

## 08-11-2011 / 12

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10:00

*Fundur lokin kl:* 12:00

| Stýrislimir | Viðmerking |
| --- | --- |
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Erik Davidsen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

**Fundarmál nr: 46**

FKF Jour. nr: 09-152

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Ferðsla, lógarbroyting -ATV

Málslýsing: Í telduposti dagf. 13. septembur, bjóðar VMR felagnum at viðmerkja broytingaruppskot til ferðslulógnina viðv. lendisfarandi akførum (ATV).

Um uppskotið:
Politiski viljin í løgtinginum og í landsstýrinum er, at fáa skipaðar reglur fyri lendisfarandi akfør (ATVarar), sum verða nýtt í vinnuligum ella "semi" vinnuligum høpi, so sum entreprenørar, elfeløg, telefeløg, bóndur og seyðamenn, sum hava tørv á koyring í lendinum langt burtur frá alfaraveg, í sambandi við sítt virksemi. Harumframt eru tað eisini feløg, sum bjóða skipaðar útferðir við lendisfarandi akførum í fjøllunum.
Ætlanin er ikki at loyva koyring við løttum lendisfarandi akførum (sports-ATVarum) á vegi.
Viðvíkjandi møguligum skað hesin ferðsla kann hava á náttúruna, kunnu ásetingar møguliga gerast við støði í galdandi løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing ella við eini serlóg um koyring í lendinum á sama hátt, sum sviar hava gjørt.

Fyri kommunurnar, er helst møguleiki at avmarka møguligan skaða á náttúruna í Byggi- og býarsamtyktini, við at beina frítíðarkoyring við ATV á avmarkað øki.

Fundarsamtykt: Fartoyið verður mett at vera so óstabilt, at ferðslumarkið eigit í mesta lagi at vera 30 km um tíman í bygum øki, og í óbygdum øki 50 km.
Eigarar av fartoyinum eiga at kunna vísa á viðkomandi vinnuligt virksemi. Hetta fyri at avmarka talið av hesum slag av fartoyum.
Um talan kann bliva um stuttleikakoyring í lukkaðum øki (forlystelsespark), har talan er um vinnuligt virksemi hjá eigaranum av akførunum, skal kommunan, sum gevur loyvi til virksemið, kunna áseta reglur, sum taka atlit til vernd av nátturuni í økinum.
Somuleiðis, eigir ferðavinnan, sum bjóðar túrar við lendisakførum út í náttúruna, at hava góðkendar leiðir at ferðast eftir.
Tikið verður undir við viðmekingunum til avleiðingarnar av hesum slagi av ferðslu og avmarking av henni í haga, privatum ella almennum, har viðkvom øki eru við fugli og plantum eru.
Neyðugt er at hava reglur, sum ger tað møguligt hjá fútanum at handhevja.

Svarskriv samtykt.

*Støða: Svarskriv 09-152_3, dagf. 13. oktobur til Innlendismálaráðið*

**Fundarmál nr: 47**

FKF Jour. nr: 09-154

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Lutaíbúðarfeløg, lógaruppskot

Málslýsing: Í telduposti dagf. 13. septembur, bjóðar Vinnumálaráðið felagnum at viðmerkja uppskot til løgtingslóg um lutaíbúðarfeløg.

Av tí at freistin at svara var 22. septembur, er málið viðgjørt í FK-bólkinum.
Ongar viðmerkingar vóru til uppskotið.

Fundarsamtykt: Svarskriv samtykt.

*Støða: Svarskriv 09-154_4, dagf. 22. septembur sent VMR.*

**Fundarmál nr: 48**

FKF Jour. nr: 09-153

Reist av: Innlendismálaráðnum

Fundarmál: Atkomuviðurskifti, kunngerðarbroyting

Málslýsing: Í telduposti dagf. 13. septembur, bjóðar Innlendismálaráðið felagnum at viðmerkja uppskot til broyting í kunngerð um atkomuviðurskifti.

Av tí at freistin at svara var 30. septembur, er málið viðgjørt í TU-bólkinum.
Ongar viðmerkingar vóru til uppskotið.

Fundarsamtykt: Svarskriv samtykt.

*Støða: Svarskriv 09-154_4, dagf. 30. septembur sent IMR.*

**Fundarmál nr: 49**

FKF Jour. nr: 09-156

Reist av: Vinumálaráðnum

Fundarmál: Arbejdsstridigheder

Málslýsing: Í skrivi dagf. 12. septembur, bjóðar Vinnumálaráðið felagnum at viðmerkja uppskot til løgtingslóg um at broyta lov om mægling i arbejdsstridigheder.

Málið var beint til KA til endaliga avgreiðslu.

Fundarsamtykt: Góðtikið.

*Støða: Avgreitt.*

---

**Fundarmál nr: 50**

FKF Jour. nr: 09-019

Reist av: Formanninum

Fundarmál: Eitt kommunufelag

Málslýsing: Kunning um gongdina.

Fundarsamtykt: Næsti fundur 18. novembur.

*Støða: Í bíðistøðu.*

---

**Fundarmál nr: 51**

FKF Jour. nr: 09-158

Reist av: Almannaráðnum

Fundarmál: Serflutningsskipanin, val av umboði

Málslýsing: Almannaráðið hevur í telduposti dagf. 31. oktober, ávarað um, at vegna nýtt landsstýri, skal Serflutningsskipanin veljast av nýggjum. Í løtuni er tað Johan Christiansen / Asbjørn Djurhuus, sum umboða felagið.

Fundarsamtykt: Asbjørn Djurhuus. Eykalimur, Delmar Tausen.

*Støða: Í bíðistøðu.*

---

**Fundarmál nr: 52**

FKF Jour. nr: 09-127

Reist av: SSP

Fundarmál: Avbjóðingar og menningarleiðir hjá pørtunum

Málslýsing: Í samband við eitt arbeiði sum er ígongd at eftirmeta SSP, heitir SSP á partarnar at lata skrivligt íkast til ein samandrátt av, hvørjar avbjóðingar – menningarleiðir eru fyri hvønn av pørtunum í SSP-samstarvinum. Íkastið skal lýsa hvørjar avbjóðingar, geirin partarnir vara av, hevur fyri eitt virkið og uppbyggjandi SSP.

Stýrið verður biðið at kanna, um baklandið hevur okkurt hesum viðvíkjandi at leggja til málið.

Fundarsamtykt: Stýrið eftirlýsir meiri sjónligheit úti í økjunum.

*Støða: Avgreitt.*

**Fundarmál nr: 53**

FKF Jour. nr: 09-104

Reist av: Formanninum

Fundarmál: Fíggjarætlan 2011, eykajáttan

Málslýsing: Formaðurin skýtur upp, at játtanin til restina av dampsperruni í 2012 verður flutt til 2011, soleiðis at arbeiðið kann gerast liðugt.

Fundarsamtykt: Samtykt.

*Støða: Avgreitt.*